H E I L S U F R Ø Ð I L I G A   S T A R V S S T O V A N

Tórshavn, hin 21. juni 2002
Málnr.: 612-200200033-8
Tykkara málnr.:
Málsviðgeri: HE / 35 64 25

P/F Polyplast
Akranesgøta 9
FO-100 TÓRSHAVN

# UMHVØRVISGÓÐKENNING
# AV PLASTVIRKINUM
# HJÁ POLYPLAST P/F


1. Góðkenning ........................................................ 2

2. Umsóknin ........................................................ 2
   2.1 Av viðkomandi tekningum eru: ..................... 2
   2.2 Av øðrum viðkomandi upplýsingum eru: ....... 2

3. Lýsing av virkinum ................................................ 2

4. Lýsing av umhvørvisviðurskiftum .......................... 3

5. Málsviðgerð ........................................................ 3

6. Góðkenningartreytir ................................................ 3
   Innrætting og rakstur ................................................ 3
   6.2 Luft og luktur ................................................ 4
   6.3 Óljóð og ristingar ........................................ 4
   6.4 Vatn og spillvatn ........................................ 4
   6.5 Kemikaliugoymsla ........................................ 5
   6.6 Burturkast ................................................ 5
   6.7 Óhapp ........................................................ 5
   6.8 Innaneftirlit ................................................ 5
   6.9 Rakstrarskráseting ........................................ 5

7. Alment ........................................................ 5

8. Kæruvegleiðing ................................................ 6



Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. **+298 356 400**
Fax. **+298 356 401**
E-mail: feagency@hfs.fo
Homepage: http:\\www.hfs.fo

## 1. Góðkenning

Við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 um umhvørvisvernd frá 29. oktober 1988 og grein 1, stk. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994, um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvis-verndarlógini til Heilsufrøðiligu starvsstovuna, verður við hesum sagt frá, at Heilsufrøðiliga starvsstovan kann veita umhvørvisgóðkenning til plastvirkið hjá P/F Polyplast v/Jógvan Háskorð á Akranesgøtu 9 í Tórshavnar kommunu.

Umhvørvisgóðkenningin verður givin við teimum treytum, sum eru lýstar í partinum um "Góðkenningartreytir" niðanfyri, og upplýsingum, ið eru móttiknar saman við umsóknini.

## 2. Umsóknin

Heilsufrøðiliga starvsstovan fekk tann 23. januar 2002 umsókn um umhvørvisgóðkenning frá P/F Polyplast.

Saman við umsóknini eru móttiknar tekniskar upplýsingar um rávøru, framleiðslu og útleiðingar, umframt kort, sum sýna staðsetingina og innrættingina av virkinum.

Henda góðkenning varð hin 13. mai 2002 send til ummælis hjá P/F Polyplast og Tórshavnar kommununu. Á fundi millum nevndu partar hin 11. juni 2002 vóru onkrar smávegis broytingar gjørdar viðvíkjandi útleiðing av kølivatni í regnvatnsleiðing, umframt at krav varð sett um skráseting av vatnnýtsluni á virkinum.

Formateret: Punktopstilling

### 2.1 Av viðkomandi tekningum eru:

- Arbeiðshøll og íbúð, stovuplanur (akt. 3, tekn. nr. 001).
- Arbeiðshøll og íbúð, síður og skurður (akt. 3, tekn. nr. 001).
- Planur við matrikulering (akt. 5, tekn. nr. 009).
- Kloakkplanur (akt. 5, tekn. nr. 003).
- Arbeiðshøll og íbúð, arbeiðsgongd (akt. 5, tekn. nr. 001).
- Matrikulkort fyri 1083$^{y}$ (akt 6).
- Yvirlitsmynd yvir arbeiðsgongd, útbúnað og dálkingarkeldur (akt 6).
- Yvirlitsmynd yvir rørmaskinu (akt 6).

Formateret: Punktopstilling

### 2.2 Av øðrum viðkomandi upplýsingum eru:

- Upplýsingar um útlát frá Borealis A/S (akt. 5).
- Tíðarætlan (akt. 4).
- Umsókn um umhvørvisgóðkenning (akt 6).
- Byggisamtykt (akt 6).

## 3. Lýsing av virkinum

Virkið verður staðsett á matr. nr. 1083$^{y}$ í Tórshavn (sí fylgiskjal 6).

P/F Polyplast framleiðir rørleiðingar til ymisk endamál. Árliga nýtslan av rávøru er umleið 150 tons

av polyethylen granulat.

Framleiðslan av plastrørum fer fram á tann hátt, at rávøran, sum er polyethylen granulat, fyrst verður smeltað í ekstrudara, trýst gjøgnum eitt høvd, har tað fær skap, og síðani gjøgnum eitt vakuumkar, har tað fær endaliga skapið.

## 4. Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

Framleiðsla av rørleiðingum hevur við sær útlát av ymiskum evnum, m.a. kolvetnum, formaldehyd, acetaldehyd, mýrusýru, aceton, koliltu og koltvíiltu, til bæði vatn og luft. Sambært umsøkjara og veitara av framleiðsluútgerð eru útleiðingarnar so smáar, at tær ikki verða hildnar at kunna verða til umhvørvisligan ampa.

## 5. Málsviðgerð

Grundarlagið undir málsviðgerðini er fyrst og fremst tær upplýsingar, sum eru móttiknar í omanfyri lýsta tilfari.

Undir viðgerðini er serligur dentur lagdur á, at útleiðingin av útleiðingarluft og kølivatni verða hildin innanfyri mørk, sum eru mett at vera umhvørvisliga trygg.

## 6. Góðkenningartreytir

Umhvørvisgóðkenningin er treytað av fylgjandi ásetingum:

Formateret: Punktopstilling

**Innrætting og rakstur**

6.1.1 Økið, ið hoyrir til virkið, skal vera týðiliga merkt og haldast ruddiligt og reint.
6.1.2 Eitt eintak av hesi góðkenning skal altíð vera tøkt á virkinum.
6.1.3 Starvsfólkini skulu vera kunnug við innihaldið í hesi góðkenningini.
6.1.4 Øll øki, ið hoyra til virkið, har ið møguleiki er fyri, at kemisk evni so sum olja kunnu leka, skulu vera úr tøttum tilfari.
6.1.5 Virkið hevur skyldu til altíð at nýta bestu tøku tøknina (BAT[1]) fyri at minka mest møguligt um øll útlát, og skal tøka reinsiútgerðin altíð nýtast til fulnar. Virkið skal halda øll útlát so lág sum gjørligt fyri at avmarka dálkingina mest møguligt. Tey kemikaliu, ið nýtt verða, skulu hava minst møguligt árin á umhvørvið.
6.1.6 Undir arbeiði, har vandi er fyri spilli av evnafrøðiligum evnum, skal arbeiðast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.

[1] Best Available Technology.

## 6.2 Luft og luktur

Formateret: Punktopstilling

6.2.1 Virksemið má ikki verða atvoldin til royk-, lukt- ella dustampar uttanfyri økið hjá virkinum.
6.2.2 Útleiðingin frá útlufting skal vera minst 1 m yvir tak.
6.2.3 Um Heilsufrøðiliga starvsstovan ynskir tað, skulu sýni takast av útleiðingarluftini, um neyðugt verður at meta um útlátini.
6.2.4 Øll útleiðing til luftina skal vera uppeftirrættað.
6.2.5 Um ampar verða av dusti, lukti ella øðrum, skulu neyðug tiltøk setast í verk.

## 6.3 Óljóð og ristingar

6.3.1 Raksturin á staðnum má ikki hava við sær, at óljóðstøðið, ásett sum tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðstøðið í dB(A) frá virkinum, fer upp um niðanfyri standandi mørk máld við næsta grannamark, á nevndu økjum og tíðarskeiðunum:

| Dagur | Tíð | Øki 1 | Øki 2 | Øki 3 | Øki 4 |
|---|---|---|---|---|---|
| Mán. - frí. | 07.00 - 18.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Leygar. | 07.00 - 14.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Mán - frí. | 18.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Leygar. | 14.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Halgi. | 07.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allir dagar | 22.00 - 07.00 | 70 | 60 | 40 | 35 |

Øki 1: Vinnuøki og havnarøki, har meira larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 2: Vinnuøki og havnarøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarrøki.
Øki 4: Bústaðarøki.

Tað mestloyvda óljóðstøðið frá virkinum mált innandura í tíðarskeiðnum kl. 22-07 kann í mesta lagi fara 15 dB(A) upp um tey nevndu markvirðini.

6.3.2 Alt virksemi skal fara fram soleiðis, at tað ikki hevur við sær ampar av ristingum.

Formateret: Punktopstilling

6.3.3 Um ampar verða av ristingum, skulu neyðug tiltøk setast í verk til eitt støði, ið Heilsufrøðiliga starvsstovan kann góðtaka.

## 6.4 Vatn og spillvatn

6.4.1 Virkið skal máta nýtsluna av vatni.
6.4.2 Um Heilsufrøðiliga starvsstovan ynskir tað, skulu sýni takast av vatninum frá kølingini av rørunum, um neyðugt verður at meta um útlátini.
6.4.3 Ódálkað vatn frá køling av rørum, kann verða leitt í kommunalu regnvatnsskipanina.
6.4.4 Frárenslvatnið frá virkinum má ikki bera brá av olju.

Formateret: Punktopstilling

**6.5 Kemikaliugoymsla**

Formateret: Punktopstilling

6.5.1 Undir goymsluni av kemikalium skal vera kar til at taka ímóti møguligum lekum ella spilli.
6.5.2 Rúmdin á karinum skal vera størri enn rúmdin á tí størsta kemikaliudunkinum.
6.5.3 Goymslan skal vera vard móti vindi og regni.
6.5.4 Goymsla til kemikaliu skal vera læst fyri óviðkomandi.

**6.6 Burturkast**

6.6.1 Alt húsarhalds- og virkisburturkast skal viðgerast sambært galdandi lóggávu. Í løtuni er kunngerð um burturkast galdandi, nr. 147 frá 19. oktober 1995.
6.6.2 Burturkastið skal latast góðkendum móttakara, og tað skal skiljast sundur sambært ásetingum frá móttakara.

**6.7 Óhapp**

6.7.1 Henda óhapp, sum hava dálking við sær, skulu beinanvegin setast í verk tiltøk, so sum upprudding, avmarking og fyribyrging, til eitt støði, sum Heilsufrøðiliga starvsstovan kann góðtaka. Boðast skal frá til umhvørvisdeildina á Heilsufrøðiligu starvsstovuni beinanvegin.

**6.8 Innaneftirlit**

6.8.1 Kanningar sambært góðkenningartreytunum kunna verða umbidnar av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.
6.8.2 Øll sýnistøka og meting av úrslitum verður goldin av virkinum.
6.8.3 Øll sýnistøka skal gerast av felag, sum er góðkent av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.
6.8.4 Øll sýnistøka skal gerast, meðan framleiðslan er í fullari gongd.
6.8.5 Víðkað kanningarskrá kann í serligum føri verða umbiðin av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Formateret: Punktopstilling

**6.9 Rakstrarskráseting**

6.9.1 Nøgdir av vatni og allari brúktari rávøru skulu skrásetast í rakstrarbók.
6.9.2 Úrslit av kanning av oljufýri og møguligar kanningar av spillvatni skulu førast í rakstrarbók.
6.9.3 Avhendaðar nøgdir av vandamiklum burturkasti, herundir spillolju, skulu førast inn í rakstrarbók.
6.9.4 Rakstrarbókin skal vera á staðnum, og eftirlitsmyndugleikin skal kunna síggja hana eftir umbøn. Bókin skal goymast í 5 ár.
6.9.5 Uppgerð av rakstrarskrásetingunum skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuna í seinasta lagi 1. februar í avloysandi árinum.

## 7. Alment

- Virkið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið nertir við dálkingarviðurskifti virkisins, fyrr enn nýggj góðkenning er givin til hesa víðkan ella broyting.
- Eigaraskifti, navnabroyting eller avtøka skal fráboðast Heilsufrøðiligu starvsstovuni.
- Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur eftirlitið við virkinum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.
- Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóg.
- Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin kann bert verða givið boð ella forboð, um so er at:
  1) nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingar-/skaðaárin.
  2) dálkingin elvir til umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin, ella

3) dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.

- Tá ið meira enn 5 ár eru gingin eftir góðkenningina, kann Heilsufrøðiliga starvsstovan broyta treytirnar í hesi, tá ið tað er umhvørvisliga grundað, ella um betri reinsingarhættir ella minni dálkandi framleiðsluhættir eru komnir fram.

## 8. Kæruvegleiðing

Hendan avgerð kann sambært grein 66 í løgtingslóg nr. 134 um umhvørvisvernd frá 29. oktober 1988 kærast til Føroya landsstýri. Kæran skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, sum síðan sendir kæruna til Føroya landsstýri við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Vinarliga

Bárður Enni, stjóri

/

Jacob Pauli Joensen, deildarleiðari

**Avrit:** Arbeiðseftirlitið, Postrúm 1134, FO-100 Tórshavn
Føroya landfúti, Postrúm 3018, FO-110 Tórshavn
Føroya landsstýri, Vinnumálastýrið, Postrúm 377, FO-100 Tórshavn
Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postrúm 9, FO-110 Tórshavn
Náttúrufriðingarnevndin fyri Streymoyar sýslu, FO-350 Vestmanna.
Tórshavnar kommuna, Postrúm 32, FO-110 Tórshavn